


# Føroyska kravið um landgrunn á Føroyaháslættanum lagt fyri ST

Jan Müller

Landgrunnur. Umboð fyri føroyskar og danskar myndugleikar løgdu hósdagin kravið um ytra landgrunnin á Føroyaháslættanum munnliga fyri landgrunsnevnd Sameindu tjóða, CLCS upplýsir Uttanríkisráðið.

Sambært altjóðarætti eiga øll strandarlond rætt til landgrunn út fyri teirra strond.

Havrættarsáttmálin frá 1982 ásetir tó, at um eitt strandarland krevur landgrunn uttanfyri 200 fjórðingar, skal tað prógvast fyri CLCS, at ytri landgrunnurin er framhald av tess landøki. CLCS ásetir ikki mark, men tekur einans støðu til, um kravið, ið er lagt fyri nevndina, er vísindaliga nóg væl undirbygt, t.e. at landgrunnurin er framhald av avvarðandi strandarlandi.

Umvegis ST aðalskrivaran lótu landsstýrið og danska stjórnin 2. desember 2010 CLCS vísindaligu prógvgrundirnar, sum stuðla undir kravið um ytra landgrunnin á Føroyaháslættanum. Samlaða føroyska kravið er 608.890 km2,og ytsta markið røkkur 820 fjórðingar úr Føroyum sigur Uttanríkisráðið

Várseтan hjá CLCS er í ST høvuðsborgini í New York í hesum døgum, og fekk ein sendinevnd mannað við føroyskum og donskum embætisfólki í dag høvi at leggja landgrunskravið munnliga fyri CLCS. Sendinevndin greiddi frá ymiskum viðurskiftum av týdningi fyri føroyska kravið. Framløgan er formligur partur av samlaða próvtilfarinum, sum CLCS skal taka støðu til.

Írland, Bretland og Ísland krevja øki, ið umskara føroyska/danska kravið. Írland og Bretland handaðu CLCS teirra krøv á økinum í mars 2009, meðan Ísland ikki enn hevur latið inn sítt krav.

Um fleiri lond seta fram krav um sama landgrunn, skal CLCS hava samtykki frá hinum pørtunum at viðgera próvtilfarið. Støðan hjá landsstýrinum og donsku stjórnini er, at besti mátin at handfara tey umskarandi krøvini er at viðgera tey samstundis.

Fleiri lond hava latið inn krøv um ytra landgrunn og próvtilfarið, ið CLCS skal taka støðu til, er umfatandi. Tí er torført at meta um, nær CLCS fer undir at viðgera føroyska/danska kravið. Roknað verður við, at tá ið CLCS fer undir viðgerðina, fer tað at taka eini tvey ár frá byrjan til enda.

# Nýggja Sæborg sjósett í Turkalandi

**Føroyar eru komnar eitt týðandi stig nærri at økja um sín frálandaskipaflota. Í vikuni var skrokkurin til nýggja Sæborg sjósettur í Turkalandi. Skipið skal gerast liðugt á Havyard skipasmiðjuni í Noregi, og eftir ætlan verður skipið latið reiðarínum í Lorvík síðst í september 2011. Tað skal skrásetast í FAS, og øll manningin verður føroysk.**



Jan Müller

Supply Service fekk sítt fyrsta skip til frálandavinnuna í 2009. Skipið er skrásett í FAS og manningin er føroysk. Talan var um skipið "Eldborg", sum síðani levering hevur havt sáttmála við Songa Delta samtakið. Hetta samtak fevnir um oljufelagið Winthershall og Det Norske Oljeselskap.

Skipið er í norskum øki og arbeiðir út frá Stavanger, Bergen og Kristianssund. Jens Meinhard Rasmussen, stjóri sigur, at samstarvið hevur gingið væl, og kundin er sera væl nøgdur við føroysku manningina.

Reiðaríið hevur ætlanir um at økja um virksemið við enn einum skipi. Seinna skipið er eftir ætlan liðugt í apríl 2012. Bæði skipini eru eins og Eldborg veitingarskip, ella sokallað PSV, sum stendur fyri Platform Supply Vessel. Skipini eru ætlað til tann krevjandi marknaðin á okkara leiðum, og hetta sæst aftur á útgerðini umborð, sum lýkur øll tey seinastu krøvini hjá kundunum, m.a. innan oljurudding, rescue, dynamic positioning, serfarm oa. Tað verða 24 mans knýttir at hvørjum skipi.

Tað eru teir báðir, Tórhallur Stakså og Hans Pauli Henryson, sum verða skiparar á Sæborg.

Jens Meinhard Rasmussen sigur, at við dagsins oljuprísi eru framtíðarvónirnar jaligar. Tað er nokk til av supplyskipum, men ikki so nógv skip, sum eru so væl útgjørd. Oljufeløgini gera stórar íløgur í ár, og hetta kemur væntandi at hava eina jaliga ávirkan á marknaðin, sum hevur havt tað trupult seinastu árini.

Tað eru nógvir oljupallar í ordra, og hesir skulu allir hava veiting frá skipum. Og sjálvsagt er reiðaríið klárt og vónar eisini, at olja verður funnin við Føroyar. Hinvegin eru teir á einum altjóða marknaði, og teir kunnu tí ikki satsa uppá eina oljuvinnu í Færoyum, sum møguliga kemur sigur stjórin.

# Nærkast oljuboringum í Grønlandi

Jan Müller

Skotska oljufelagið Cairn Energy, sum herfyri boðaði frá, at tað fór at bora fýra brunnar í Grønlandi í summar, hevur nú gjørt avtalu um leigu av fýra útgerðarskipum og togarum frá felagnum Siem Offshore. Hesi skipini skulu veita tær neyðugu tænasturnar til boriskipið Ocean Rig Corcovado og boripallin Leiv Eiriksson, tá hesi fara at bora í tíðarskeiðinum frá apríl til oktober skrivar Upstream.

Herfyri ljóðaði annars, at ivi varð sáddur um boringarnar orsakað av fíggjarligu støðuni hjá felagnum í India. Cairn hevur gjørt av at selja allar sínar ognir í India og brúka part av inntøkunum í grønlenska oljuævintýrinum ístaðin. Men felagið hevur møtt trupulleikum í sambandi við søluna, tí indiska stjórnin hevur sett krøv fram um at fáa lut í hesum inntøkum. Tað eru sjey mánaðir síðani, at Cairn gjørdi av at selja 51% av sínum ognum í India til Vedanta Resources fyri knappar 10 milliardir dollarar. Hóast ósemjuna við stjórnina so sigur Cairn í tíðindaskrivi, at tað roknar við, at góðkenningin frá stjórnini kemur í rættlag. Peningurin skal so brúkast til oljuleiting í Grønlandi og til at gjalda partaeigarum vinningsbýt. Cairn er tað oljufelagið, sum veruliga trýr uppá, at olja og gass finnast í grønlendsku undirgrundini. Í fjør boraði felagið 2-3 brunnar og staðfesti bæði olju og gass.